# Fra roknisnurru til farteldu

### - NAKRAR KT-SØGULIGAR HUGLEIÐINGAR

*Petur Zachariassen:*



Haldið mær til góða, at eisini eg fari upp í tað kórið, sum syngur: "Nógv er broytt í mínari tíð".

Men á KT-økinum nýtist ein ikki at vera so ógviliga gamal, fyri at hava upplivað stórar og kollveltandi broytingar.

Og tað er ikki einans sjálvtøknin, sum hevur ment seg í risastigum, men eisini samskifti, arbeiðshættir, hugsunarháttur, ja mentanin øll er ávirkað av hesum vælsignaða fyribrigdinum KT.

**Roknisnurran og roknistokkur**

Sum ungur drongur seinast í fimtiárunum kann eg minnast, at onkur skrivstova í Havn hevði ein sonevndan hondsvingara ella eina roknisnurru at hjálpa sær til at gera útrokningar.

Umframt til samanlegging og frádrátt ber eisini til at brúka roknisnurruna til falding og deiling.

Í søguligum høpi er vert at nevna, at tær fyrstu roknisnurrurnar av hesum slagi vórðu gjørdir seinast í 1800-talinum, men longu Blaise Pascal (1623-1662) brúkti eitt líknandi prinsipp til at smíðja eitt samanleggingartól fyri at lætta um hjá pápanum, sum var tollavgreiðslumaður.

Um somu tíð, sum einstakir skrivstovumenn brúktu roknisnurru, sótu vit í roknitímunum og lærdu at brúka logaritmur til falding og deiling. Tað snilda við logaritmunum er, at tú í staðin fyri at falda tøl leggur logaritmutøl saman. Til hjálpar høvdu vit serligar logaritmutalvur, sum vóru í hvørjari skúlatasku (saman við eitt nú lærubókini Vor Fædrelandshistorie). Eg síggi enn fyri mær tætt skrivaðar síður í rokning við hópin av logaritmum.

Prinsippið í logaritmunum er somuleiðis gamalt, frá umleið ár 1600, og liggur eisini til grund fyri, hvussu ein sonevndur roknistokkur virkar.

Hann var eitt óføra hent amboð í síni tíð, tað munnu mangir tilkomnir verkfrøðingar kunna vátta.

Serliga hentur var roknistokkurin til eitt nú tekniskar útrokningar, tá ið 2-3 siffur vóru nøktandi.

Tú vart neyvan ein rættur verkfrøðingur, um tú ikki vart í grønum gummistivlum og hevði roknistokk í jakkalummanum.

At roknistokkurin hevði sítt pláss í skúlaskipanini í seksti- og sjeytiárunum sást á teimum roknistokkum í stórari støð (um ein favn til longdar), sum serliga realskúlar og miðnámsskúlar høvdu hangandi í onkrari skúlastovu saman við tí kravdu útgerðini til at brúka uppi við krittalvuni: passari, linjál og ein ella tveir trýkantar í stórari støð.

**Lummaroknarin**

Tíðliga í sjeytiárunum broyttist alt hetta, tá ið teir fyrstu lummaroknararnir sóu dagsins ljós.

Nú fekst tú gjørt allar vanligar útrokningar við hesum tólinum í lógvanum.

Tað var í 1972, at eg fyrstu ferð hevði ein rættiligan lummaroknara á hondum. Hann var frá Hewlett Packard og hevði, umframt teir grundleggjandi roknihættirnar (+, – , x , / ), eisini eina røð av funktiónsknappum.

Lummaroknarin kostaði tá eina hampuliga mánaðarløn, men eftir fáum árum var prísurin komin niður í umleið ein tíggjundapart.

Loksins vóru roknisnurran, logaritmutalvurnar og roknistokkurin goymd burtur á ovasti lofti.

Onkur vil halda, at hesi amboð ikki hava so nógv við nútímans kunningartøkni at gera.

Men skilja vit KT í breiðari merking sum tól og skipanir til viðgerð og samskifti av upplýsingum, so eigur menningin av hesum roknitólum ein týðandi leiklut í KT-søguni.

**Tey fyrstu edv-tólini**

Hóast tey fyrstu hugskotini um virkisháttin í einum edv-tóli – ella í eini teldu, sum vit nú kalla tólið – røkka aftur til 19. øld, so henda tey stóru framlopini í USA í 1940-árunum við víðfevndum granskingar- og royndarvirksemi.

Ein tann mest týðandi einstaklingurin var John von Neumann (1903-1957), ið sum tann fyrsti kom við hugskotinum um at goyma forritið í sjálvum minninum í telduni saman við upplýsingum, sum skulu viðgerast.

Hetta prinsipp kom at vera grundleggjandi fyri hvussu allar teldur síðani tá hava virkað.

Í kjalarvørrinum á hesari menning gjørdist USA undangonguland á teldu-økinum, bæði tøkniliga og handilsliga – og er tað við sama lag.

Og IBM gjørdist, serliga í 1960- og 1970-árunum, tann ráðamiklasta fyritøkan á edv-økinum, og hon er framvegis heimsins størsta teldufyritøka, sum bæði selur útgerð, forrit og tænastur.

**Edv-tól í Føroyum**

Fyri Føroyar hendi tað fyrsta stigið inn í edv-øldina í 1965-66, tá ið tænastuvirkið pf Data varð sett á stovn og peningastovnarnir og Tryggingarsambandið saman stovnaðu pf Elektron.

Tey fyrstu árini mundi tann vanligi føroyingurin ikki merkja nakað serligt til hesa søguligu hending.

Tey fyrstu edv-tólini (frá IBM sjálvandi) vórðu einamest brúkt til innanhýsis uppgávur hjá fyritøkunum, so sum bókhald og kundaskráir.

Viðgerðin tá bygdi á, at upplýsingarnar vóru goymdar á sonevndum merkingini at geva ella fáa kunnleika um eitthvørt, so í orðinum kunning hevur tú – umframt fyribrigdið kunnleika – eisini eina samskiftisdimensión.

Í onkrum høpi sæst styttingin ICT (IKT á donskum), har styttingin C (communication) fyri samskifti verður sett inn ímillum I og T.

Við tí í huga hava vit verið heppin við føroysku styttingini KT.

Styttingin KT hevur annars rættiliga fingið fótin fyri seg og hevur serliga verið nýtt sum forfesti í orðum sum t.d. KT-forum, KT-nevnd, KT-skeið, KT-vørður og KT-depil.

**Frá roknimaskinu til mentanaramboð**

"Vit eru sjálvi søga" hevur onkur vísur sagt, men tað kann verða trupult at seta nútíðina í eitt søguligt høpi.

Seinastu 10-15 árini koma vit kortini ikki uttan um eginteldurna (PC) og internetið.

T.d. hava vanligastu forritini á eginteldunum, tekstviðgerð og rokniark, gjørt miljónir av fólki kring allan heim til dúgligar teldunýtarar.

Og so internetið. Vit kenna okkum øll so bergtiknan av hesum nýggja miðli, at vit viðhvørt missa veruleikakensluna um hvat fer at henda.

Kortini er tað eingin, sum ivast í, at tað er ein kollvelting, vit uppliva.

Men so leingi internetrúsurin ikki er avrunnin, kann tað vera ilt at síggja, hvar vit enda ella lenda.

Eitt annað heiti á hesum hugleiðingum kundi eins væl verið: "Frá roknimaskinu til mentanaramboð".

Fyrst í greinini nevndi eg dømi um, hvat var í skúlataskuni hjá tí unga dronginum í 1950-árunum.

Vit kunnu nú staðfesta, at í skúlataskuni hjá tí ungu gentuni ár 2000 er m.a. ein fartelda, ið kann bindast í internetið og kostar minni enn ein mánaðarløn, og eisini ein lærubók um Føroya søgu.

# Spurnakassin

**PANEL**



Leivur Dalsgarð,
*Elektronikteknikari*

*Hava tit ein spurning um telduútbúna (HW) ella ritbúna (SW), hvat tit hava rætt og loyvi til ella okkurt heilt annað, kunnu tit senda tykkara spurning til spurnaðarkassan.*
*Í panelinum at svara spurningum hava vit serkøn fólk at heita á.*
*Sendi spurningin til sid@sosialurin.fo.*
*Í tí fyrsta blaðnum hevur KT-hornið sett Leivi Dalsgarði, elektronikteknikara, sum dagliga er stjóri á ITEC á Argjum, tveir spurningar.*

**Hvussu skjótt kann ein vanlig telefonlinja koyra?**

Eg havi leingi havt eitt móthald (modem) sum eitur 56K, men mítt samband við Olivant hevur bert verið 33K. Nú havi eg lagt Windows 98 inn á telduna og nú fái eg samband heilt uppí 44K. Spurningar mínir ljóða soleiðis: er nakað samband ímillum mína nýggja windows innlegging og skjótleikan á modemsambandinum og hvat er skjótasta samband man kann fáa við vanligum telefonsambandi?

***Mesta ferðin er 56Kbps (Kilobit pr sekund).***

*Tú sigur at tú hevur havt trupulleikar at fáa ferð við eldri útgávu av Windows og eftir at henda varð dagførd er ferðin vorin hægri. Hetta kemst helst av at drívararnir í nýggju útgávuni eru nýggjari og duga betur at samskifta millum teldu/stýrisskipan og mótald. Annars er at siga at umhvørvi ein er í ofta er avgerandi fyri ferðina á internet sambandinum um vanligt telefon samband. Til dømis kunnu ávís merkir av telefonum og fax'um avmarka ferðina. Hetta er altso um mótaldið og telefonin eru bundin at sama telefon nummari. Eisini kann órógv á linjuni gera sítt til at ferðin gerst lægri. Frá Føroya Tele verður sagt at mesta ferð er 64Mbps (Megabit pr sekund) tá er talan um talgild (digitalt) samband. Er talan um samgilt (analogt) samband so eru mótaldini í dag uppí 56Kbps, so hetta avmarkar seg í sær sjálvum. Samanumtikið so er tað fyrsta ein kann gera tá slíkir trupulleikar stinga seg upp, er at kanna um teir nýggjastu drívarirnir liggja inni og møguliga taka alt annað enn mótaldið av kaðalinum. Hjálpir hetta ikki so er at fáa fatur á serkønari hjálp!*

*Leivur Dalsgarð*

**Tráðleyst netsamband**

Er tað sætt at netverk eru tráðleys í dag, og at tað ber til at samankobla teldur í dag við hjálp av infrareyðum strálum? Hvussu verður hetta gjørt og hvør tøkni verður nýtt til endamálið?

***Tað ber væl til***

*Ja tað letur seg gera at binda teldur saman í einum tráðleysum neti. Hetta verður oftast gjørt við radiobylgjum. Tú spyr eisini um tað letur seg gera at binda teldur saman við infareyðum strálum. Jú tað leur seg gera, men hetta er ikki eitt rættuligt net av tí at infareyðar strálur ikki so lætt fara í gjøgnum heilt, so sum veggir og annað. Tí hevur ikki verðið so nógv gjørt við hetta. Upprunaliga ætlanin við infareyðum var eitt minni net ímillum teldur, prentarar, ljóslesarar og líknandi. Um ein hevði eina farteldu og kom inn á eina skrivstovu og teldan varð tendrað, so fann teldan beinanvegin út av hvør útgerð var inni í rúminum, og kundi soleiðis beinanvegin fáa samband við tey tól ið har vóru. Men soleiðis er tað ikki í veruleikanum. Tí fyri tað fyrsta so hevur stýrisskipanin ikki allar drívarir liggjandi inni og fyri tað næsta so krevur hesin samskiftis háttur, at tey infareyðu portrini, skulu venda næstan beint ímóti hvørjum øðrum.*

*Radiobylgjur eru betur at arbeiða við. Um ikki ov nógv av elektronisk órógv eru inni í einum skrivstovuhølum, so letur tað seg gera at fáa samband millum teldur upp í umleið 500 metur avstand við 11Mbps, við til dømis einum PCMCIA korti, ið er innbygt í telduna. Um størri net skulu bindast saman so letur hetta seg eisini gera. Talan kann verða um* samskifti ímillum bygningar heilt uppí 10 km við 11Mbps, men tá krevst eisini at antennur verða settar upp.

*Leivur Dalsgarð*

*Hevur tú ein spurning til spurnakassan skriva til: sid@sosialurin.fo*



# Vit byrja har hinir enda

**Um nakrar heilt fáar mánaðir tekur Alnót Telecom upp kappingina við Føroya Tele og tá verður tað við fullari megi. Jónsvein Joensen, verkætlanarleiðari, sigur, at teir ætla sær at útvega sær kundar við at bjóða tilboð, sum kappingarneytin ikki bjóðar. Og talan er ikki bara um internet.**

*Sveinur Tróndarson*



*Ólavur Ellefsen og Jónsvein Joensen á veg upp.*
*Í løtuni er Ólavur stjóri men tá Alnótin fer í luftina um nakrar mánaðir verður Jónsvein stjóri.*
*Og hann smæðist ikki fyri at siga, at Alnótin ætlar sær at taka dystin upp um kundarnar.*

Fyri nøkrum mánaðum síðani varð eitt nýtt felag stovnað við navninum VITA. Ætlanin var at hetta felagið skuldi taka kappingina upp við Føroya Tele og í fyrsta umfari skuldi dentur leggjast á internetið. Síðani hevur ikki so nógv verið at hoyrt frá felagnum.

Men tað er har kortini. Nú við einum nýggjum navni tí Vita-navnið kom tvørt fyri hjá onkrum øðrum og tí skifti felagið navn til Alnót Telecom.

Málsetningurin hevur vist eisini fingið eitt kvink uppeftir, tí ístaðin fyri at leggja dent á internetið hevur felagið valt at leggja dent á, frá fyrsta degi, at vera ein seriøsur kappingarneyti hjá Føroya Tele, sum annars hevur sitið einsamalt á øllum telemarknaðinum.

**Kappast á øllum økjum**

Sum skilst á verkætlanarleiðaranum, Jónsveini Joensen, so metir hann tað vera góðar møguleikar fyri at taka kappingina upp við Føroya Tele. Eftir hansara tykki er tænastan haðani ikki betri enn næstbest.

- Tað liggja nógvir møguleikar uttanfyri tað, sum Føroya Tele bjóðar og tað er tann vegin Alnótin ætlar sær at fara. Vit ætla okkum at taka um endan har hinir hava slept, og tað fer at gagna kundunum meiri enn á ein hátt, sigur Jónsvein.

Hann vísir á, at tá ein veitari fær kapping, so er hann noyddur til at fylgja við og tað fær kundin gagn av. Samstundis plagar kapping at síggjast aftur á prísunum og tí fær kundin eisini gagn av.

- Og tað er endamálið við kappingini, sigur Jónsvein.

Jónsvein vísir á, at føroyingar eru langt aftan fyri í menningini av eitt nú internetsambandinum og telekervinum og tað er nakað, sum Alnótin ætlar sær at gera nakað við.

**Føroyskt felag**

Tá eitt felag skal í holt við eina so stóra verkætlan, er sjálvsagt, at tað krevst nógvur peningur til endamálið. Soleiðis er eisini við Alnótini. Men hvussu hava teir fingið peningin til vega.

- Tá vit byrjaðu bjóðaðu vit føroskum íleggjarum at seta pening í felagið, men tað gekk heldur striltið. Fólk eru eitt sindur varin, men vit hava fingið eitt sera skilagott samstarv við Framtaksgrunnin, sum hevur víst ein framúrskarandi vilja til at fáa hesa verkætlanina upp at koyra, greiðir Jónsvein frá.

Grunnurin hevur annars ikki altíð fingið so góð skotsmál í sambandi við nýggjar verkætlanir, men tað er ikki nakað, sum tit kunnu taka undir við?

- So avgjørt ikki. Men tíverri var tað ikki nóg mikið við tí Framtaksgrunnurin setti í, og tí hava vit so avgjørt, at fara út um landoddarnar at útvega okkum tann írestandi kapitalin.

Men er tá ikki vandi fyri, at tað verða útlendingarnir, sum fáa avgerandi orðið at siga?

- Nei, tað verður ikki talan um í hesum førinum. Hóast talan er um útlendskan kapital, so verður avgerðarrætturin á føroyskum hondum, sigur Jónsvein, sum kortini ikki vil siga hvørjir útlendsku íleggjararnir eru.

Hetta verður almannakunngjørt um ikki so langa tíð og tá verður eisini almannakunngjørt, hvørjar útlendskar samstarvsfelagar Alnótin Telecom fer at fáa sær.

**Samráðast upp á lívið**

Tað, sum mesta tíðin í løtuni fer við er, at fáa tær ymsu samstarvsavtalurnar upp á pláss. Alnótin skal keypa seg inn á netið hjá Føroya Tele og tað er ikki bara sum at siga tað at finna fram til ein prís. Eydnast tað ikki, so verður skorið ígjøgnum av landsstýrinum hóast tað í veruleikanum er Fjarskiftiseftirlitið, sum ger tað arbeiði. Og Jónsvein heldur, at Fjarskiftiseftirlitið hevur víst ein sera positivan anda.

- Tað hevur verið sera positivt at arbeiða saman við teimum, sigur hann.

Hvussu samráðingarnar fara at ganga er sjálvandi ikki gott at vita, men hóast tað, so væntar Jónsvein, at lív kemur í Alnótin Telecom áðrenn summarið kemur. Og tað fer at hava við sær nýggj arbeiðspláss.

- Eg rokni við at vit byrja við eini seks-átta starvsfólkum, men við vaksandi virksemi fer tað vónandi at økjast, sigur hann.

Tað merkir sostatt, at føroyskir telekundar fara at fáa møguleikar at velja hvønn veitara teir vilja brúka, og tað verður ikki bara til internettænastu, men eisini til annan flutning. Tað verði seg vanliga telefoni, fartelefoni, .....

WWW.VIT.FO Tlf: 31 99 14
SKEIÐ - NETUMSITING - HEIMASÍÐUR
JournalVIT - GóðskuVIT - KommunuVIT - IntraVIT

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
útbúgving, eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177 • FO 110 Tórshavn
Tel. 31 88 13 • Fax 31 33 74
T-postur: fh-sth@post.olivant.fo
Heimasíða: http://sth.olivant.fo

FØROYA TELE
FAROESE TELECOM
Tinghúsvegur 3 • Postrúm 27 • 110 Tórshavn
Tel. 30 30 30 • Fax 30 30 31
T-postur: ft@ft.fo
Heimasíða: www.tele.fo

ELEKTRON
...ein livandi leiklut í kunningarsamfelagnum

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 > Tlf.: 317620 > Fax: 317699 > www.tt.fo



Vit hava stórt úrval av:
Teldum > EDV-tilhoyri
Printarum > Telefax
Scannarum > Forritum
Telduspølum > Fartelefonum
Skrivstovumøblum

TELDU-KOYRIKORT



Nýggj skeiðtænasta frá Farodane

Teldukoyrikortið er evropeiskt prógv, sum er grundað á góðkendan KT-førleika. Ein førleika, sum prógvar at luttakarin hevur staðið sjey royndir í nýtslu av teldu og mest vanligu forritunum.
Teldukoyrikortið er grundað á royndir innan tey sjey fakøkini, sum eru mest umráðandi sambært KT-krøvunum í upplýsingarsamfelagnum í dag.
Royndirnar kunna takast á royndardepli, sum er góðkendur av Dansk Dataforening. *Skeiðstovan Kvasir er góðkendur royndardepil.*

TELDUKOYRIKORT
SKEIÐHEITI: MI-SP
Mikudagar seinnapart, kl. 13.00-16.15
SKEIÐHEITI: TÝ&FR-FP
Týs- og fríggjadagar fyrrapart, kl. 09.00-12.15
SKEIÐHEITI: TÝ&HÓ-KV
Týs- og hóskvøld, kl. 16.00-19.30
Fyrsta skeiðið byrjar 4. apríl
TILMELDING frá heimasíðu okkara: kvasir.farodane.fo
- ella ringið tlf. 211861 ella 311414. e-mail: kvasir@farodane.fo

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
SKOTARÓK 14
100 TÓRSHAVN
TLF. 211861 og 311414
FAX 317534
fd-3a-00